# Ravnur FC er 23. limafelagið í FSF

Á aðalfundinum í FSF leygardagin fekk nýggja eysturoyarfelagið, Ravnur FC, limaskap í fótbóltssambandinum. Sostatt kann felagið vera við í fótbóltskappingum á jøvnum føti við onnur feløg. Ravnur FC er 23. limafelagið í Fótbóltssambandi Føroya. – Vit fegnast um limaskapin og kunnu nú av álvara fara til verka. Vit eru einir 25-30 mans, sum fyri tað mesta hava tilknýti til Skálafjørðin, sum eru spentir eftir at sleppa í gongd, sigur Jákup A. Olsen, formaður í nýggja felagnum, sum byrjar sína tilveru í 3. deild. – Enn er ikki endaliga greitt, hvar vit koma at hava heimavøll, men arbeitt verður í løtuni við at fáa okkum innivist á onkrum av vallunum við Skálafjørðin.



# Strandaðir í neistarokinum

**Strandingar fingu av at vita á Hálsi ígjár. Neistin er nú bert tvey stig frá oddinum, og er greipan veruliga í eygsjón**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

StÍF eru nú strandaðir í ongamannalandi ímillum botnin og heiðurskrónurnar. Var ein síðsti møguleiki at nærkast triðja plássinum, so er hann definetivt rokin nú. Við bert 4 umførum eftir eru 6 stig upp til H71 á triðja plássinum. Neistin, sum sendi StÍF heim til vestara arm á Skálafjørðinum við einum stórtapi, lat hinvegin ongan iva verða um, hvat teir hava sett nøsina eftir. Fyrra steypið er longu komið í hús, men eingin ivi skal verða um, at teir bláu tevja enn meiri gull og heiður.

### Ári Dam vísti stórspæl

Neistin hevði ein livandi múr í málinum. Ári Dam í málinum vísti sannan landliðsklassa, og ússaliga úrtøkan hjá strandingum í 2. hálvleiki sigur alt um fantastiska avrikið hjá Ára. Strandingar fingu neyðars 6 mál í 2. hálvleiki. Strandingar royndu at hanga í neistamonnum í 1. hálvleiki, og var munurin í steðginum bert trý mál. Men í 2. hálvleiki gjørdist talan um ein sannan klassamun, sum vísti heili 22-6 til Neistan. Teir bláu vístu veruligt meistaraspæl í 2. hálvleiki. Heimaáskoðarnir kunnu eisini fegnast um, at ungt blátt blóð er á veg. Bert 18 ára gamli Sjúrður Thomasson slapp at royna seg á vøllinum eina løtu, og verður óivað meir at frætta frá honum tey komandi kappingarárinum. Neistin er nú bert 2 stig aftanfyri VÍF, og hevur liðið eisini betri málúrtøku enn vestmenningar. Tað er ikki á hvørjum kappingarári, at Neistin vinnur bæði landskapping og steypakapping, men í ár er møguleikin sanniliga til staðar.

## FAKTA um dystin

**Neistin-StÍF 35-16 (13-10)**

**Neistin:** Karl Herup Olsen 10, Birgir Hansen 8, Tróndur Kragesteen 7, Jugoslav Djomic 3, Ingi Olsen 3, David Edvardsen 2, Áki Mørk 2

**StÍF:** Christian Preda 3, Bent Djurhuus 3, Bárður Danielsen 2, Jóanes Prestá 2, Alexandur Johansen 2, Borgar Danielsen 1, Hávardur Trúgvason 1

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 16 | 12 | - | 1 | - | 3 | 417 | 338 | 79 | 25 |
| 2 VB | 16 | 11 | - | 0 | - | 5 | 462 | 382 | 80 | 22 |
| 3 Neistin | 16 | 9 | - | 3 | - | 4 | 424 | 385 | 39 | 21 |
| 4 Tjaldur | 15 | 9 | - | 2 | - | 4 | 408 | 355 | 53 | 20 |
| 5 StÍF | 16 | 3 | - | 0 | - | 13 | 392 | 481 | -89 | 6 |
| 6 Kyndil | 15 | 0 | - | 0 | - | 15 | 263 | 425 | -162 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF *) | 15 | 12 | - | 0 | - | 3 | 419 | 391 | 28 | 24 |
| 2 H71 | 16 | 10 | - | 0 | - | 6 | 430 | 372 | 58 | 20 |
| 3 Neistin *) | 15 | 10 | - | 0 | - | 5 | 448 | 409 | 39 | 20 |
| 4 StÍF | 16 | 6 | - | 2 | - | 8 | 381 | 394 | -13 | 14 |
| 5 Kyndil | 16 | 4 | - | 2 | - | 10 | 384 | 432 | -48 | 10 |
| 6 KÍF | 16 | 3 | - | 0 | - | 13 | 378 | 442 | -64 | 6 |

*) Kappingarnevndin hevur ógildað úrslitið av dystinum millum Neistan og VÍF tann 18. januar, og tí er hesin ikki roknaður við á stigatalvuni

